## KLUB Sosialurin

Limir í Klub Sosialinum eru allir haldarar av Sosialinum. Sum limur í Klub Sosialinum kanst tú taka lut í tiltøkum, sum skipað verður fyri, eins og tilboð av ymsum slag eisini eru atkomulig við limaskapinum. Fyrsta tilboðið, sum Sosialurin skipar fyri, verður nú gjørt í samstarvi við Atlantic Airways, og eru hetta lesaraferðir til Skotlands. Tiltøk og tilboð annars verða lýst í Sosialinum. Bæði pappírs- og internetútgávuni.

Ert tú longu haldari av blaðnum, hevur tú longu limaskap í Klub Sosialinum. Og nýggir haldarar gerast sjálvandi limir, so skjótt haldaragjaldið er goldið.



*til*

# Edinburgh

*og aftur fyri* **kr. 995,-**

*Túrurin er:*
28. mai 2005



### Jú, tú las rætt! - kr. 995,-

Í samband við at Sosialurin hevur latið upp í Vágsbotni bjóða Sosialurin og Atlantic Airways haldarunum hjá Sosialinum ein dag túr til Edinburg fyri einans kr 995,- Um tú ikki ert haldari av Sosialinum kanst tú fylla lepan út á síðuni og senda hann til Sosialin. Tað er avmarkað pláss á hesum túrum, og hvør haldari kann bara keypa tveir ferðaseðlar.

### Við Sosialinum av Farstøðini til Edinburgh Castle og aftur sama dag

Við bussi av farstøðini vestur í Vágar. Komin til Edinburgh verður farið við bussi inn í býin, sum er ein sonn søgulig perla, men eisini ein super nýtíðmans býur. Uml 500.000 fólk búgva í Skotska høvuðsstaðnum, sum eisini hýsir tí skotska Parlamentinum.

Koyrt verður eftir the Royal Mile við Edinburgh Castle í ovara enda og The Palace of Holyroodhouse (har enska Drotningin húsast, tá hon er í Edinburgh) við hin endan. Steðgað verður við Edinburgh Castle.

Vitjið inn á slottið og/ella the Whiskey Heritage Museum, sum liggur beint við. Royn handlarnar, caféirnar og pubbirnar á the Royal Mile og síðu- gøtum. Ella gang ein túr oman á Princess Street, har tú finnur eina ørgrynnu av handilsmiðstøðum.

Skandinaviskur ferðaleiðari verður við. Koyrt verður frá Edinburgh Castle kl. 16.30 út á flogvøllin.